# Føroyskur bókadagur í Keyp

**Aftur í ár skipaði Føroya Húsið í Keypmannahavn fyri bókadegi, og at døma eftir góðu uppmøtingini er áhugin fyri føroyskum bókmentum stórur millum útisetar**

ÚTISETALÍV
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Meðan bókavørurin Hugni Eide skipaði fyri mentanarliga partinum, so skipaði stjórin í Føroya Húsinum Martin Fjallstein fyri at karmarnir vóru í lagi, og sum altíð kendu fólk seg vælkomnan í Føroya Húsið har heimabakaðar kakir og nýbryggja kaffi góvu bókadegnum ein hugnaligan*




Sunnudagin var árligi bókadagurin í Føroya Húsinum í Keypmannahavn, og sum vant var hópin av fólki savnað í húsunum á Vesterbrogade 17A, sum gjøgnum tíðinar hevur verið karmur um bæði kirkju og horihús, men seinastu 11 árini hevur verið nalvin í føroyskum útisetalívi í Danmark.

Bókadagurin er høvið hjá føroyskum útisetum at síggja allar tær føroysku bøkurnar, sum eru komnar út seinast árið, eisini er møguleiki at keypa onkra av bókunum. Hetta er sostatt bæði eitt høvi, at ogna sær bókmentir, at keypa nakrar av jólagávunum ella bara at fáa eina mentanarliga uppliving.

Føroyski bókadagurn hevur verið fyriskipaður í nógv harrans ár. Føroyahúsið hevur bókasavn, og virkar á hendan hátt í tí dagliga fyri at betra um møguleikan hjá útisetum at fylgja við í føroyskum bókmentum, Bókasavnið er ikki heimsins størsta, men er rættiliga umfatandi. Her eru nýggjar bøkur, eins og gamlir klassikarar. Ein bókavørður tekur sær av savninum, og í løtuni er røkir Hugin Eide hetta starv. Hann hevði eisini høvuðsábyrgdina av at fyriskipa mentanarliga partin av bókadegnum.

Hugin læs sjálvur burtur úr nýggjum bókmentum, og gav soleiðis áhoyrarunum smakksroyndir av nøkrum av teimum áhugaverdu bókunum, ið eru komnar til hetta árið.

Guðrun Gaard, sum hevur skrivað doktararitgerð um útisetan og skaldið Regin Dahl, helt áhugaverdan fyrilestur um skaldið. Men Regin Dahl er nógv meira enn eitt skald, eisini løgini hjá Regini eiga eina stóra hyll í føroysku mentanarreolini, og tvey av hesum vórðu framførd meistarliga av Ernst Sondum Dalgarð og Páll Sólstein, ið hevði klaverfylgispæl. Teir framførdu harumframt tvey operaløg.

Umframt mentanarliga partin er hugnin og góða kafein altíð ein partur av bókadegnum, og aftur í ár bar til at njóta góða kakuborið afturvið einum góðum kaffi ella temunni. anda. Martin var blíður og týður sum altíð.




*Rithøvunduri Jógvan Isaksen var komin inn í Føroya húsið at vísa fram sína nýggjastu bók "Kross Messa", hetta var eitt gott høvið hjá teimum, ið ynsktu eina signeraða bók, at fáa rithøvundin at seta sítt navn í hana*




*Ímillum bøkurnar vóru bøkur fyri ung sum eldri, og fólk blaðaðu dugliga í teimum, bókadagurin er eitt frálíkt høvið hjá útisetum í Keypmannahavnarøkinum at halda sín bókmentakunnleika dagførdan.*